# Evnisvika um Alexandur Kristiansen á Oyrarbakka

**Hesa vikuna hava Norðskála/Oyra skúli á Oyrarbakka og Tjørnuvíkar skúli lagt saman. Hetta er aðru ferð hetta skúlaárið, at skúlarnir leggja saman í eina viku við serligum evni. Hesaferð er evnið Alexandur Kristiansen. Næmingar fáa serligt innlit í skaldaheimin hjá Alexanduri, sum eisini vitjar skúlan. Um vikuskiftið verður framsýning við tí, næmingarnir hava gjørt og mánakvøldið, 17. mai kl. 20.00, skiparSunda bókasavn fyri kvøldsetu. Alexandur Kristiansen fer at greiða frá um skaldaverk sítt, yrkingar og týðingar, og Bárður Jákupsson, sum hevur myndprýtt bókina Grísaflísa-Pætur, tosar um tað at tekna til børn og um tekningar hjá børnum**

EVNISVIKA/ FRAMSÝNING

Sjóðandi lív er um allan skúlan. Í bólkum við 3 - 5 næmingum royna næmingarnir at fáa tað at ríma, og tað eydnast hjá teimum flestu. Øll møtast aftur í Skálanum, lesa sínar yrkingar, fáa viðurkennandi viðmerkingar frá Alexanduri, og so er tíðin komin at takka fyri seg og biðja farvæl. Tjørnuvíksbørn skunda sær til bussin, og hini hvørva so líðandi. Alt gongur sera friðarliga fyri seg. Næmingarnir eru mettir av upplivingum, og nú er gott at sleppa út í ta frísku luftina.

Spyrt tú onkran av næmingunum, hvat var best í dag, siga tey, at alt var gott, men at torførast var at mála á lørift og at fáa rímið at sita - men stuttligt var tað.

Tjørnuvíkar skúli og Norðskála/Oyrar skúli hava lagt saman hesa vikuna. Hetta er aðru ferð í hesum skúlaárinum. Til jólar vóru skúlarnir saman um at fyrireika jólini, úrslitið var eitt stórfingið jólahald, ið var sýnt fleiri ferðir og í báðum bygdum.

Hesaferð hava skúlarnir sett hvør øðrum stevnu fyri at fáa innlit í skaldaheimin hjá Alexanduri Kristiansen. Sum kunnugt hevur Alexandur yrkt nógv til børn, fleiri av yrkingarsøvnunum eru komin út við nótum og á fløgu. Ymiskir teknarar hava myndprýtt og hava harvið sett sín serliga dám á útgávunar. Alexandur er vorðin fólkaogn, ella kanska rættari barnaogn, og næmingarnir halda seg eiga í honum og vildu fegin, at hann kom aftur í morgin, so hann kundi lisið meira úr nýggjasta yrkingarsavni sínum, sum fer at koma út í oktober.

Tímatalvan er sett til viks, og tey 60 børnini hava verið virkin frá morgunstundini. Byrjað verður við morgunsangi í Skálanum. Hesa vikuna syngja vit : Av einglamunni komu boð, sum Alexandur hevur yrkt. Síðan lesa øll í einar 20 minuttir. 60 børn lið um lið, ikki eitt kis.

Síðan varð farið í flokkarnar, greitt varð frá um Alexandur Kristiansen, um yrkingarsøvnini, og yrkingar vóru lisnar. Tá ið tímin var liðugur var langt fríkorter. So var tíðin komin til sangløtuna í Skálanum. Vit sungu sangir hjá Alexanduri, bæði kendar og ókendar. Eisini royna vit at fáa rapp-sangin at rigga.

Aftaná matarsteðgin og langa fríkorterið verður aftur farið í flokkarnar, nú velur hvør næmingur sær

Framhald á s. 16



*Tímatalvan á skúlanum er sett til viks, og tey 60 børnini hava verið virkin frá morgunstundini. Við eldhuga hava tey roynt at sett saman orð til yrkingar og litir til myndir*



*Ein av uppgávunum var, at næmingarnir skuldu velja sær eina yrking hjá Alexanduri og tekna hana*



*Alexandur er vorðin fólkaogn, ella kanska rættari barnaogn, og næmingarnir halda seg eiga í honum og vildu fegin, at hann kom aftur í morgin, so hann kundi lisið meira úr nýggjasta yrkingarsavni sínum, sum fer at koma út í oktober.*







KUNDARÁÐGEVAR TIL TÓRSHAVN OG VÁGAR

Søkt verður eftir kundaráðgevum til deildirnar í Tórshavn og í Vágum.

Visjónin hjá Føroya Sparikassa er at vera brúkaravinarligasti peningastovnur í Føroyum. Vit ynska at veita kundum okkara ta bestu ráðgevingina og tænastuna.

Í starvinum sum kundaráðgevi verður dentur lagdur á heildarráðgeving og sølu, t.v.s. at ráðgivið verður um øll viðurskifti av týdningi fyri kundan, m.a. innlán, útlán, pensjón, íløgur, tryggingar og gjaldsmidling.

Uppgávurnar hjá kundaráðgevunum eru m.a.:

- ábyrgd og røkt av egnari kundaportufølju
- heildarráðgeving og søla
- kredittviðgerð
- ymiskar ad hoc-uppgávur

Vit ynskja okkum starvsfelagar, ið hava góð samstarvsevni og hava hug og evni at arbeiða við kundum.

Kundaráðgevarnir mugu hava góð evni at umstilla seg í einum broytiligum umhvørvi.

Umsøkjarar skulu hava viðkomandi útbúgving, eitt nú peningastovnsútbúgving við Finansiel Videreuddannelse ella líknandi.

Størvini verða sett skjótast gjørligt. Lønin verður sambært sáttmála millum AFF og SFS.

Størvini eru nærri lýst á www.sparikassin.fo

Áhugað kunnu seta seg í samband við Marjun Eystberg, starvsfólkaleiðara á tel. 34 85 10 ella á e-mail *marjun.eystberg@ sparikassin.fo*

Skrivlig umsókn skal vera starvsfólkadeildini í hendi í seinasta lagi mikudagin tann 26. mai 2004.

Send umsóknina til:
FØROYA SPARIKASSI
Att.: Starvsfólkadeildin
Yviri við Strond 2
FO-100 Tórshavn

REPROZ

FØROYA SPARIKASSI




# Loysti seg hjá Bjarna Djurholm at hava tol

**Tað, sum løgtingið samtykti hósdagin, fer at fáa stóran týdning fyri hvønn einasta føroying, sum eigur jørð, ella sum festa jørð**

LANDBÚNAÐUR
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin*

At taka landbúnað upp á tungu í Føroyum, er sum at festa í fjús. Tað hevur ongin ásannað betri enn Bjarni Djurholm, landstýrismaður í landbúnaðarmálum.

Í fleiri ár hevur hann roynt at broyta jarðarlóggávurnar, men tað hevur gingið ómetaliga strilti.

Men nú royndi hann aftur og hesuferð eydnaðist. Hósdagin samtykti løgtingið einmælt týðandi broytingar í jarðarlóggávunum. Og tað eru tey, sum enntá meta, at hetta var einki minni enn ein stórsigur hjá landsstýrismanninum.

So stór orð vil lands-stýrismaðurin ikki sjálvur brúka, men hann er ómetaliga fegin um, at tað loksins eydnaðist at broyta lógirnar.

Tað, sum løgtingið samtykti hósdagin, var at broyta bæði lógina um landsjørð og lógina um búnaðargrunn.

Nú løgtingið hevur broytt lógina um landbúnaðarjørð er tað greitt, at jarðarráðið fer í søguna.

– Lógin um landsjørð er ein leivd frá 1937, áðrenn vit fingu heimastýrið. Men støðan hevur verið tann, at øll hesi seinastu árini, er tað landsstýrismaðurin, sum hevur havt ábyrgdina av landsjørðini, men tað er jarðarráðið, sum hevur havt myndugleikan

– Tað hevur verið ein stórur trupulleiki at ábyrgd og myndugleiki ikki hava fylgst at. Men nú hevur løgtingið samtykt, at ábyrgd og myndugleiki fylgjast at og tað er eitt stórt framstig. Samstundis bera broytingarnar í sær, at nú kunnu bøndur leggja raksturin av festinum í eitt partafelag.

– Sostatt fáa teir somu skattligu og aðrar fyrimunir, sum partafelagslógin ásetir og tað skuldi givið teimum nógv betri møguleikar sum sjálvstøðugt vinnurekandi og at rikið festi á vinnuligum grundarlagi.

Hann leggur afturat, at tað ber ikki til at leggja sjálvt festi í partafelag, tí tað er ogn hjá landinum.

Bjarni Djurholm sigur, at eftir teimum broytingum, sum Løgtingið nú hevur samtykt, fer tað at bera til at avskriva skuld hjá festarum.

– Jarðargrunnurin hevur einar 50 milliónir útistandandi, sum í veruleikanum eru avskrivaðar, tí ongin møguleiki er at fáa peningin innaftur. Men tað er ikki heimild til at strika skuldina og í fleiri ár hevur Landsgrannskoðarin víst á, at hesi viðurskifti mugu fáast í rættlag.

Tað er tað nú!

Tað, sum løgtingið hevur givið landsstýrismannin heimild til, er at fyrireika saneringina. Ta ið tað er klárt, skal málið aftur fyri løgtingið fyri at fáa endaligu heimildina til saneringina.

Bjarni Djurholm er sannførdur um, at fyri at veruliga gongd á eina menning av landbúnaðinum, er tað ein heilt avgjørt fortreyt, at skuldarspurningurin verður endaliga avgreiddur.

## Nú kunnu vit koma víðari

Men Bjarni Djurholm sigur, at tað, sum nú er hent, er ikki meiri enn sjálvt byrjanin.

– Tað, sum hendi í løgtinginum hósdagin, er bara tað, at nú er spónurin settur í jørðina, kunnu vit siga. Samtyktirnar í løgtinginum bera í sær, at nú liggja bæði ábyrgd og myndugleiki á búnaðarøkinum hjá landsstýrismanninum og sostatt ber loksins til at leggja ein landbúnaðarpolitikk til rættis, soleiðis sum skiftandi løgting vilja tað og tað er eitt veldugt framstig í royndunum at menna landbúnaðirn, sigur landsstýrismaðurin.

Og Bjarni Djurholm sigur, at tað er avrátt í samgonguni, at nú skal hann fara eitt stig víðari.

Hann fer nú at taka øll tey mongu álitini, sum eru skrivað um landbúnaðin seinastu nógvu árini framaftur.

Og hann leggur afturat, at øll tey mongu álitini, sum eru skrivað, eru eitt gott grundarlag at byggja á, tá ið framtíðar búnaðarpolitikkurin skal stingast út í kortið.

Næsta stigið verður at seta eina nevnd við umboðum fyri landsstýrið, bóndafelagið, Óðalsfelagið og kanska onnur við, til at stinga framtíðar landbúnaðarpolitikkin út í kortið og til at gera uppskot um, hvussu landbúnaðurin skal skipast.

Men hann ætlar sær eisini at seta ein politiskan fylgibólk við einum umboði úr hvørjum flokki, so at hann alla tíðina hevur vissu fyri at hann fær undirtøku fyri tí, sum hendan nevndin stingur út í kortið, so at arbeiðið ikki enn einaferð verður til onga nyttu.

Hann væntar, at hetta arbeiðið fer at taka tað mesta av einum ári.

## Fyrimunir og vansar við at selja festi

Arbeiðssetningurin hjá nevndini er ikki skrivaður enn og hann er heldur ikki avtalaður í samgonguni. Men landsstýrismaðurin sær fyri sær, at ein uppgáva hjá nevndini verður at lýsa metingar um fyrimunir og vansar við at selja tey smæstu festini, so at smáfestarar og traðarfólk kunnu fáa møguleika at keypa síni brúk. Í øðrum lagi heldur hann, at fyrimunir og vansar við at selja tey stóru festini, eigur eisini at verða lýstur.

– Eg síggi fyri mær, at tað verður neyðugt at geva festum møguleika fyri at keypa festini.

Men hann leggur afturat, at hetta er fyri hansara egnu rokning, tí tann spurningurin er ikki viðgjørdur í nevndini.

Í øllum førum heldur hann, at tað verður neyðugt at taka spurningin um ognarviðurskiftini upp, tí hann heldur, at spurningurin um ábyrgd og skyldur hjá tí einstaka bóndanum, er neyvt tengt at ognarviðurskiftunum. Eigur bóndin festi, kann hann seta tað í pant og klárar hann ikki sínar skyldur, fer hann á heysin og kann missa festi, eins og øll onnur vinnurekandi og tað er ikki galdandi í dag

Hann heldur á heimasíðu síni at tað er eisini neyðugt at kanna skipanir, sum geva møguleika fyri skilnað ímillum áhugabrúk og vinnubrúk og at skapa umstøður fyri, at varðveita og menna landbúnaðin á útoyggj og harímillum kanna møguleikar fyri alternativum landbúnaði á smáplássum.

Somuleiðis kann hugsast, at nevndin fær til uppgávu at gera metingar um, antin tað kann verða til gagns fyri samfelagið at skapa karmar fyri stórrakstrargørðum í miðstaðarøkinum, til t.d. bíliga mjólkaframleiðslu, sum skal kunna bera seg uttan stuðul frá tí almenna.

Men samstundis heldur hann, at nevndin eisini skal kanna møguligar karmar fyri áhuga-landbúnaði á plássum, har ongin vinnuligur landbúnaður er, og har møguleikarnir ikki eru upplagdir at hava vinnuligan landbúnað.

Og harafturat sær hann fyri sær, at uppgávan hjá nevndini verður at kanna, hvørjar tillagingar tað er neyðugt at gera í matrikullógina fyri at leggja upp fyri broytingum, sum eru nevndar frammanfyri.



*– Tað eru tey sum meta, at tað, sum hendi í tinginum hósdagin, var onki minni enn ein stórsigur til Bjarna Djurholm, landsstýrismann*

## Umstríddur norðmaður til Føroya at tosa um fosturtøku

Í hesum døgum er umstríddi norðmaðurin, Ludvig Nessa í Føroyum.

Tað er felagsskapurin Føroya Pro Vitae, sum hevur fingið hann hendavegin.

Pro Vitae hevur ársfund í Mentanarhúsinum í Fuglafirði í dag klokkan 14 og tá fer hann at halda almennan fyrilestur um fosturtøku.

Í annaðkvøld, sunnukvøldið, klokkan 18. fer hann at tala á felagsfundi í Christianskirkjuni í Klaksvík.

Ludvig Nessa er kendur fyri sítt áhaldandi stríð fyri ófødda barninum og framferðin hjá honum hevur verið so umstrídd, at í 1991 varð hann koyrdur úr almenna prestaembæti sínum í Noregi.

Hetta er aðru ferð at Ludvig Nessa heldur fyrilestur hjá Pro Vita í Føroyum.